UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, tann 3. mai 2022
J.nr.: 22/05605-1

Reglugerð
fyri
játtan til verkætlanir innan framburð og menning á landbúnaðarøkinum

Endamál

§ 1. Reglugerðin ásetur treytir fyri nýtslu av játtan á konto 6.33.2.01. Landbúnaðarroyndir og -ráðgeving, undirkonta 21. Verkætlanir.

Stk. 2. Játtanin er ætlað til stuðul til verkætlanir, sum á nýskapandi hátt menna landbúnað og landbúnaðarframleiðslu í Føroyum. Yvirskipað skulu verkætlanirnar vísa á veruligar møguleikar fyri menning og vøkstri í landbúnaðinum.

Í høvuðsheitum skal talan vera um kanningar, verkligar royndir ella verkætlanir, sum vísa nýggjar leiðir ella sum leggja nýggja og viðkomandi vitan aftur at verandi framleiðsluhættum, mannagongdum o.ø.

Royndirnar skulu gerast í samstarvi við Búnaðarstovuna, sum skal tryggja, at úrslitini gerast atkomulig hjá almenninginum og tøk hjá øðrum at brúka.

Stk. 3. Játtanin kann eitt nú verða nýtt til kanningar, skjalfesting og til praktiskar royndir.

Umsiting

§ 2. Búnaðarstovan umsitur játtanina og ger avtalur um samstarv við eksternar luttakarar. Búnaðarstovan tryggjar, at verkætlanin er í samsvari við hesa reglugerð og árligu løgtingsfíggjarlógina konta 6.33.2.01.21.

Stk. 2. Verkætlanir, har bert Búnaðarstovan luttekur, skulu góðkennast av Umhvørvis- og vinnumálaráðnum.

Treytir

§ 3. Búnaðarstovan kann fremja verkætlanir saman við bøndum, felagsskapum o.ø.

Stk. 2. Búnaðarstovan ger saman við luttakandi pørtunum eina skrivliga samstarvsavtalu, sum skal fevna um:

a. lýsing av verkætlanini og væntaða úrslitinum,
b. greining av samsvarinum millum endamálið við verkætlanini og endamálið við játtanini,
c. lýsing av luttakarunum og
d. arbeiðs-, tíðar- og kostnaðarætlan fyri verkætlanina

GONGIN 7 • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN • TELEFON 30 66 00 • E-MAIL: UVMR@UVMR.FO

Stk. 3. Búnaðarstovan ger saman við luttakandi pørtunum eina frágreiðing um verkætlanina. Búnaðarstovan ásetur í játtanarskrivinum í hvørjum líki, frágreiðingin skal latast og nær.

Umsókn

§ 4. Umsóknir skulu latast Búnaðarstovuni. Lýst verður eftir verkætlanum á heimasíðuni hjá Búnaðarstovuni, www.bst.fo. Freistin er tríggjar vikur.

Stk. 2. Umboð fyri Búnaðarstovuna og Umhvørvis- og vinnumálaráðið viðgera innkomnu umsóknirnar.

Útgjald

§ 4. Játtanin til verkætlanina verður útgoldin, tá Búnaðarstovan hevur gjørt ella móttikið verkætlanarroknskap.

Stk. 2. Útgjald kann eisini verða goldið fyri ávegis verkætlanarroknskapir.

Stk. 2. Verkætlanarroknskapurin skal lúka treytirnar í §§ 21-22 í kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.

Gildiskoma

§ 5. Henda reglugerð kemur í gildi beinanvegin.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, 3. mai 2022

Magnus Rasmussen
landsstýrismaður

/Herálvur Joensen
aðalstjóri